# FÆRØERNE FOR SÅ VIDT ANGÅR DANSKERNE

## Kanning um hvat danir vita og halda um Føroyar og føroyingar



OLE WICH 2013

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi



# FÆRØERNE FOR SÅ VIDT ANGÅR DANSKERNE

## Kanning um hvat danir vita og halda um Føroyar og føroyingar



JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

Mai 2013


www.atlantic.fo

# Innihald


| | |
|---|---|
| *Formæli: Vitan er fyritreytin fyri góðum samstarvi* | **5** |
| *Um kanningina* | **6** |
| *Ríkisfelagsskapurin* | **9** |
| *Vitan um blokkstuðul* | **12** |
| *Vitan og meiningar um Føroyar í ríkisfelagsskapinum* | **13** |
| *Grindaveiða og samkynd* | **18** |
| *Vitan og meiningar um samkynd* | **18** |
| *Vitan og meiningar um grindaveiðu* | **20** |
| *Ferðavinna* | **23** |
| *Vitan um føroyskar fyritøkur* | **26** |


# Talvuyvirlit:

*Allir spurningarnir og øll svarini frá kanningini eru ikki við í hesum riti.*

*Á **www.jaf.fo** undir **"Útgávur"***
*er yvirlit yvir allar talvur og viðmerkingarnar frá svargevunum.*



# VITAN ER FYRITREYTIN FYRI GÓÐUM SAMSTARVI

Í Føroyum hoyra og lesa vit dagliga um viðurskifti í Danmark, og í føroyska skúlanum verður undirvíst bæði í donskum, á donskum og um Danmark. Hinvegin fylla Føroyar ikki nógv í almenna kjakinum ella skúlanum í Danmark. Ofta fáa føroyingar ta fatan, at danir hvørki vita um ella skilja føroysk viðurskifti - og at áhugin eisini er lítil. Men hvussu er støðan í veruleikanum? Hvat vita og halda danir um Føroyar og føroyingar? Tað er ongantíð áður gjørd ein umfatandi kanning av hesum - og tí hevur Javnaðarflokkurin á Fólkatingi gjørt tað nú.

Onkur kann spyrja, um tað hevur nakran týdning, hvat danir vita ella ikki vita um Føroyar. Tað hevur tað. Vantandi vitan skapar gróðrarbotn fyri fordómum, og fordómar kunnu bæði forða fyri góðum samstarvi og skapa split og illstøðu. Tað sóu vit til dømis, tá danska pressan á mangan fordómsfullan hátt umrøddi Føroyar í sambandi við bankakreppuna í nítiárunum.

Vitan er fremsta fortreyt fyri einum virðiligum dialogi og samstarvi innan bæði politikk, vinnulív, skúlaskap og mentan. Politiskt er dialogurin neyðugur, tí danskir politikarar eru við til at skapa karmin um ríkisfelagsskapin. Tí var Javnaðarflokkurin á Fólkatingi tann 21. februar í ár við til at orða og samtykkja hesa áheitan á donsku stjórnina: "Fólkatingið leggur dent á tørvin á áhaldandi dialogi um møguleikar og avbjóðingar í ríkisfelagsskapinum. Ein góður dialogur er fortreytin fyri javnbjóðis og virðiligum samstarvi millum partarnar (...) Fólkatingi heitir á stjórnina um at skipa fyri einum árligum spurnarorðaskifti á Fólkatingi, har kjakast kann opið um møguleikar og avbjóðingar í ríkisfelagsskapinum".

Men í einum fólkaræði hevur fatanin hjá vanligum fólki minst líka stóran týdning sum tað, ið serfrøðingar og politikarar halda, og tí er henda kanningin gjørd. Vónandi kann hon bæði vísa hvar tørvur er á upplýsing og perspektivera kjakið um møguleikarnar fyri samstarvi millum londini á øllum økjum.

Kanningin er gjørd í samstarvi við fyritøkuna YouGov, og tey, sum hava arbeitt við henni á skrivstovu Javnaðarfloksins á Fólkatingi eru Eirikur í Jákupsstovu, Djóni Højgaard, Barbara Jacobsen, Joan Ólavsdóttir og Sjúrður Skaale. Regin Reinert, hagfrøðingur, hevur greinað tølini.

*Á Fólkatingi, mai 2013*
*Sjúrður Skaale*
*fólkatingsmaður*

# Um kanningina

Kanningin er gjørd umvegis internetið, har 1007 fólk í tíðarskeiðinum 6. - 10. mars 2013 hava svarað einum spurnablaði. Fyritøkan YouGov tryggjar, at alt er gjørt á fakliga dyggum grundarlagi.

Tey 1007 fólkini eru spurd um teirra vitan og meiningar um ávís viðurskifti. Svarini eru síðani býtt sundur í fýra bólkar – alt eftir, hvussu nógv fólk vistu. Á hendan hátt fæst at vita, hvussu vitanin hjá fólki ávirkar teirra meiningar.

Tey, sum svaraðu, eru býtt í "vitanarbólkar" á tann hátt, at tey hava fingið stig fyri hvørt rætt svar, sum tey góvu uppá teir faktuellu spurningarnar. Spurningarnir blivu býttir upp soleiðis, at jú torførari spurningurin var, jú fleiri stig gav hann. Svargevarnir hava fingið stig frá 0 upp í 15, og eru tí býttir upp soleiðis:

**< 6** eru tey, ið vita sera lítið ella onki um Føroyar
**6-9** eru tey, ið vita lítið um Føroyar
**9-12** eru tey, ið vita eitt sindur um Føroyar
**> 12** eru tey, ið vita nógv um Føroyar

Talvan niðanfyri vísir, hvussu vitanarbólkarnir eru deildir upp, og hvussu nógvir svargevar eru í hvørjum bólki.

| **Vitanarbólkar** | **< 6** | **6-9** | **9-12** | **>12** | **Total** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tal av svargevum** | 149 | 341 | 307 | 210 | 1007 |
| **Vektað tal av svargevum** | 154 | 346 | 305 | 202 | 1007 |
| | 15% | 34% | 30% | 20% | 100% |

Ein nærri lýsing av svargevunum innan vitanarbólkarnar vísir samanhang millum aldur, geografi og útbúgving.

## Vitanarstøðið býtt á aldur




Myndin omanfyri vísir, at týðiligt samband er millum aldur og vitan um Føroyar. Eldri danir vita sum heild væl meira um Føroyar enn yngri danir.

## Vitanarstøðið býtt eftir bústaði




Vitanin um Føroyar er áleið tann sama um alt Danmark, hóast okkurt bendir á, at fólk í Norðurjyllandi vita eitt vet meira um Føroyar enn onnur. Ein orsøk til hetta kann vera, at Norrøna hevur siglt til Hanstholm og nú siglir til Hirtshals, og at nógvir føroyingar búgva har um leiðir. Hetta hevur helst havt við sær, at føroyskt vinnulív, eitt nú farmaflutningur og føroysk ferðavinna, hava verið meiri sjónlig har enn aðrastaðni í Danmark.

## Vitanarstøðið býtt á útbúgving




Myndin omanfyri vísir greiðan samanhang millum vitan um Føroyar og útbúgving. Jú longri útbúgving fólk hava, jú meira vita tey um Føroyar.

## Vitanarstøðið býtt á hvat fólk valdu seinasta fólkatingsval




Henda myndin vísir eitt ávíst samband millum hvønn flokk danir velja og hvat tey vita um Føroyar.
Sum heild vísa svarini, at teir danir, ið vita mest um Føroyar, eru tilkomnir og hava eina longri útbúgving.

# RÍKISFELAGSSKAPURIN

Ríkisfelagsskapurin fyllir ikki serliga nógv í politiska kjakinum í Danmark, men danir vita tó í stóran mun hvat ríkisfelagsskapurin er. Men tá spurt verður nærri um støðu Føroya í ríkisfelagsskapinum, vita teir minni.

**Hvørji lond eru í ríkisfelagsskapinum?**




84% av dønum vita, at londini í ríkisfelagsskapinum eru Danmark, Grønland og Føroyar – 16% vita tað ikki. 10% halda at Ísland eisini er partur av ríkisfelagsskapinum, meðan 2% halda at Føroyar als ikki eru við. 4% siga seg ikki vita.

**Hvussu heldur tú, at rættarstøða Føroya er – í mun til Danmark?**




78% vita, at Føroyar eru ein sjálvstýrandi partur av danska kongaríkinum – 22% vita tað ikki. 12% halda, at Føroyar eru ein nationalstatur sum Danmark. 5% halda Føroyar vera ein danskan landslut og 4% siga seg ikki vita.

**Hvussu heldur tú, at viðurskiftini við politiskum flokkum eru í Føroyum?**




68% av dønum vita, at tað eru føroyskir politiskir flokkar í Føroyum, meðan 19% halda at donsku flokkarnir eisini hava deildir í Føroyum. 3% halda at danskir flokkar hava deildir í Føroyum, meðan 11% siga seg ikki vita.

**Heldur tú, at Føroyar hava sína egnu stjórn?**




Tá spurt verður um hvørt Føroyar hava egna stjórn, svara 32% nei. 61% av dønum vita, at Føroyar hava sína egnu stjórn og 7% siga seg ikki vita.

**Hvussu nógv føroysk umboð verða vald á Fólkating?**




Tríggir fjórðingar av dønum vita, at tvey føroysk umboð verða vald á Fólkating, meðan 7% halda, at talan er um fýra umboð. 5% siga at ongi umboð verða vald og 1% halda at føroysku umboðini eru fimm. 12% siga seg ikki vita.

## Grundlóg




76% av dønum vita, at danska grundlógin eisini fevnir um Føroyar, meðan 9% halda, at Føroyar hava egna grundlóg. 3% halda at Føroyar onga grundlóg hava, meðan 12% siga seg ikki vita.

## Hvønn nationalitet, heldur tú, at íbúgvarnir í Føroyum hava?




Tá spurt verður um hvønn nationalitet/tjóðskap føroyingar hava, svara 61% at føroyingar hava sín egna, meðan 35% siga, at føroyingar hava danskan nationalitet. 2% meina at føroyingar hava íslendskan nationalitet, meðan 2% siga seg ikki vita.

Her er týdningarmikið at hava í huga, at spurningurin ikki skilir millum løgfrøðiligan og mentanarligan nationalitet. Tí er sannlíkt, at fleiri hava hugsað um løgfrøðiligan ríkisborgararætt og ikki um tjóðskap í mentanarligum týdningi.

# VITAN UM BLOKKSTUÐUL

Nógv kjak er um blokkstuðulin í Føroyum, men í Danmark er vitanin ikki stór um hesa veiting.

**Hvussu nógv, heldur tú, at Føroyar fáa í árligum blokkstuðli frá Danmark?**




46% søgdu seg ikki vita hvussu stórur stuðulin er, og bara 6% svaraðu, at stuðulin er minni enn ein milliard árliga. 23% hildu tað vera umleið 2 milliardir, 17% hildu tað vera áleið 5 milliardir, og 8% svaraðu yvir 10 milliardir. Nærum helmingurin av dønum hava eina skeiva fatan av hesum máli, meðan hin helmingurin ikki veit.

**Hvønn týdning hava Føroyar fyri Danmark?**




Omanfyri er yvirlit yvir, hvørt danir halda, at Føroyar hava jaligan búskaparligan og mentanarligan týdning fyri Danmark. Myndin vísur týðiliga, at danir halda Føroyar hava størri mentanarligan enn búskaparligan týdning fyri Danmark. Men heldur ikki mentanarliga týdningin halda teir vera serliga stóran.

**Hvør av fylgjandi útsøgnum passar, eftir tínari meining, til framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum?**




40% av dønum halda tað hava týdning, at Føroyar verða verandi í ríkisfelagsskapinum. 35% halda tað ongan týdning hava, 18% siga seg ikki vita og 8% halda at best hevði verið, um Føroyar fóru úr ríkisfelagsskapinum. Tey, sum halda felagsskapin við Føroyar hava týdning, eru sostatt ein minniluti.

# Vitan og meiningar um Føroyar í ríkisfelagsskapinum

Vitanin hjá dønum um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark er avmarkað. Teirra meiningar eru í stóran mun grundaðar á skeiva fatan av, hvussu nógv Føroyar kosta Danmark í blokkstuðli.

**Í hvønn mun heldur tú, at tað yvirskipað hevur ein jaligan mentanarligan týdning fyri Danmark, at Føroyar eru partur av ríkisfelagsskapinum?**




Á hesi myndini eru svarini uppá hvørt tað hevur jaligan mentanarligan týdning fyri Danmark, at Føroyar eru í ríkisfelagsskapinum, býtt upp í vitanarbólkar. Her sæst týðiliga at tey, sum vita um Føroyar, eisini halda Føroyar hava mentanarligan týdning fyri Danmark. Tey við minstu faktuellu vitanini svara í nógv størri mun "veit ikki" tá tey verða spurd um sína meining.

**Í hvønn mun heldur tú, at tað yvirskipað hevur ein jaligan búskaparligan týdning fyri Danmark, at Føroyar eru partur av ríkisfelagsskapinum?**




Svarini viðvíkjandi búskaparliga týdningi Føroya fyri Danmark vísa ikki sama sterka tilknýti millum vitan um Føroyar og áskoðan á búskaparliga týdningin av Føroyum. Her er nøkulunda javnt millum bólkarnar, burtursæð frá, at tey sum vita minst, í størri mun siga seg ikki vita.

**Hvør er tín meining um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum?**




Her sæst, at tey, ið vita mest um Føroyar, í størri mun ynskja at Føroyar skulu verða verandi í ríkisfelagsskapinum. Ein annar áhugaverdur samanhangur er, at tey, ið vita meiri um Føroyar eisini í størri mun vilja, at Føroyar skulu fara úr ríkisfelagsskapinum. Sambandið millum vitan og meining er tó ikki heilt greitt í hesum føri, tí bæði í næstovasta og ovasta vitanarbólki eru umleið 10%, ið halda tað vera best, um Føroyar fóru úr ríkisfelagsskapinum.

Grundgevingarnar fyri hví fólk halda, at Føroyar skulu úr ríkisfelagsskapinum eru ymiskar. Tey, ið svaraðu, fingu høvi at grundgeva fyri sínum svari uppá henda spurning, og niðanfyri eru grundgevingarnar hjá teimum, ið vita mest um Føroyar, fyri hví Føroyar skulu fara úr ríkisfelagsskapinum:

*Bedst for Færøerne at være selvstændige.*
*De kan selv betale for alle deres tunneller.*
*De koster hvert år den danske stat en formue i bloktilskud.*
*De må klare sig selv.*
*De vil sikkert gerne være herre i eget hus.*
*Det er en selvstændig kultur, som er noget forskellig fra vores, og de fortjener at være selvbestemmende.*
*Det er for dyrt.*
*En besparelse for os.*
*Fordi vi så slap for de nordatlantiske mandater i Folketinget.*
*Færøerne fortjener selvstændighed.*
*Giver ikke mening at fastholde denne gamle "institution".*
*Jeg tror at den Færøske befolkning ønsker selvstændighed.*
*Rigsfællesskabet bør ophæves.*
*Så skal de ikke have penge.*
*Vi er så fjernt fra hinanden, både mentalt og fysisk.*
*Vi putter penge i noget vi ikke få noget for.*
*Vi skal ikke fortsætte med at være kolonimagt.*

Áhugavert er, at somu fólk sum góvu hesi svarini, øll svaraðu skeivt uppá spurningin um, hvussu nógv Føroyar fáa í blokkstuðli um árið. Niðanfyri eru teirra grundgevingar fyri, hví Føroyar skulu úr ríkisfelagsskapinum, settar inn í teirra svar um hvussu nógv Føroyar fáa í blokkstuðli:

**Uml. 2. mia. kr.**

*De kan selv betale deres tunneller.*
*De vil sikkert gerne være herre i eget hus.*
*Færøerne fortjener selvstændighed.*
*Grønland og Færøerne skal være selvstændige nationer.*

**Uml. 5. mia. kr.**

*Bedst for Færøerne at være selvstændige.*
*Det er en selvstændig kultur, som er noget forskellig fra vores, og de fortjener at være selvbestemmende.*
*Vi putter penge i noget vi ikke få noget for.*

**Yvir 10 mia. kr.**

*De koster hvert år den danske stat en formue i bloktilskud.*
*Giver ikke mening at fastholde denne gamle "institution".*
*Veit ikki*
*De må klare sig selv.*
*Det er dyrt for os.*
*En besparelse for os.*
*Fordi vi så slap for de nordatlantiske mandater i Folketinget.*
*Jeg tror at den Færøske befolkning ønsker selvstændighed.*
*Rigsfællesskabet bør ophæves.*

*Så skal de ikke have penge.*
*Vi er så fjernt fra hinanden, både mentalt og fysisk.*

Svarini vísa, at danir í stóran mun halda Føroyar kosta ov nógv, og at Danmark fær ov lítið fyri pengarnar. Men tey hava heilt skeiva fatan av hvussu nógv Føroyar fáa í blokkstuðli frá Danmark. Og tað áhugaverda er, at ovasti vitanarbólkur hevur heilt holla vitan um føroysk viðurskifti annars.

Niðanfyri eru nakrar grundgevingar frá sama vitanarbólki, ið veit mest um Føroyar, fyri hví tað ongan týdning hevur um Føroyar verða verandi í ríkisfelagsskapinum ella ei:

*Danmark skal droppe imperialismen, det hører fortiden til.*
*Det betyder ikke noget for Danmark. Men noget for Færøerne, da de står stærkere internationalt.*
*Det er mere gammel tradition end sund fornuft der holder Færøerne og Danmark knyttet sammen i rigsfællesskabet.*
*Det har nok haft sin tid.*
*Færøerne er i forvejen en selvstændig stat, har eget parlament og vil helst agere som stat – så er der ingen mening i at Danmark subsidierer tunneller, havneanlæg etc. i Færøerne.*
*Færøerne kan blive selvstændige hvis de vil.*
*Hvad bidrager de med???*
*Hvad skal vi med Færøerne? Der er jo ingenting deroppe, andet end fisk og får.*
*Hvis vi får del i deres undergrund er det OK at vi forsørger dem pt. ellers skal de kunne klare sig selv økonomisk.*
*Isoleret set ville vi spare penge og det virker ikke som den typiske færing værdsætter at være en del af rigsfællesskabet.*
*Koster penge.*

Og sami vitanarbólkur grundgevur m.a. soleiðis fyri hví Føroyar skulu verða verandi:

*Danmark har brug for at være så stor som muligt.*
*De er for små til at klare sig selv uden et betydeligt tab i levestandard, og omvendt har Danmark sikkerhedspolitiske interesser i området, som er værd at betale for.*
*De stærke historiske bånd igennem århundreder.*
*Der kan være store økonomiske fordele ved at beholde det nuværende rigsfællesskab pga. ressourcerne i undergrund og hav.*
*Det ville være en styrke for både Færøerne og Danmark.*
*Det ville svare til at give Bornholm til Sverige.*
*Fællesskab gør stærk.*
*Færøerne er for lille til at være selvstændige.*
*Færøernes økonomi kan pt ikke hænge sammen uden blokstøtte fra Danmark.*
*Historien, undergrund etc.*
*Jeg elsker Færøerne. Færøerne hører til Danmarks historie og det vil være et kæmpe kulturelt tab for Danmark at miste noget så værdifuldt. Færøerne er for små til at kunne klare sig selv.*
*Større alsidighed, bredere kulturelt grundlag.*
*Territoriale grænser, kultur.*
*Vi har betalt for deres overforbrug og derfor kan de med rette betale tilbage med den olie der måske dukker op under øerne.*

Ovasti vitanarbólkur leggur dent á mentanarliga og søguliga týdningin av Føroyum í ríkisfelagsskapinum og halda í stóran mun, at Føroyar eru ov veikar búskaparliga

og at íbúgvaratalið er ov lágt, til at Føroyar kunnu klára seg sum sjálvstøðug tjóð. Ein onnur gjøgnumgangandi grundgeving fyri hví Føroyar skulu verða verandi í ríkisfelagsskapinum er territoriali týdningurin fyri Danmark og føroyska undirgrundin. Teir svargevar í sama vitanarbólki, sum ikki meta tað hava nakran týdning um Føroyar verða verandi í ríkisfelagsskapinum ella ei, siga í stóran mun, at Føroyar kunnu loysa um tey vilja, og seta spurnartekin við, um ríkisfelagsskapurin fer at yvirliva.

Tey flestu í niðasta vitanarbólki grundgeva ikki fyri teirra svari um ríkisfelagsskapin. Grundgevingarnar hjá næstniðasta vitanarbólki, fyri hví Føroyar skulu verða verandi í ríkisfelagsskapinum eru m.a. soljóðandi:

*De har en stor kulturel betydning for Danmark, og Færøerne er en del af den danske historie.*
*Det er jo bare en del af Danmark.*
*Det er nok mest af nostalgiske grunde at jeg gerne ser rigsfællesskabet bestå som ide.*
*Færøerne er alt for lille til at være selvstændige i det lange løb. Som vi har set, står de rigtig dårligt hvis økonomien vælter.*
*Historisk og kulturel værdi. Hvorfor skulle de ikke..*
*I fællesskab er det nemmere at løfte opgaven.*
*Jeg tror ikke de kan klare sig uden Danmark.*
*Kulturel diversitet og historie.*
*Rigsfællesskabet bør blive sammen, idet ingen af landene hver for sig er store nok til at gøre sig gældende internationalt.*
*Tradition.*
*Tror ikke, at de kan klare sig uden vores tilskud.*
*Vil gerne have, at Færøerne forbliver en del af rigsfællesskabet, men at bloktilskuddet bliver mindre.*

Næstniðasti vitanarbólkar grundgevur m.a. soleiðis fyri hví tað ongan týdning hevur, um Føroyar verða verandi í ríkisfelagsskapinum ella ei:

*Danskerne er da ligeglade med dem :)*
*De er af så lille betydning økonomisk og kulturelt, så om de er med eller ej er uden betydning.*
*De koster os kun penge bidrager med intet.*
*De må gerne blive, men hvis de ønsker at være sig selv, må de også gerne det.*
*Der bliver mere afstand mellem landene politisk, og øerne bliver lidt glemte i det politiske.*
*Folk på Færøerne lever i forvejen ganske selvstændigt og uafhængigt af Danmark.*
*Færøerne kan ikke tilføre Danmark noget.*
*Hvis Færøerne er klar til selvstændighed så skal de have den. Således er det ikke længere Danmarks ansvar at støtte Færøerne økonomisk.*
*Ingen betydning.*
*Jeg tror det er vigtigt for Færøerne at blive i rigsfællesskabet, men ikke så vigtigt for Danmark.*
*Nej - tror ikke det betyder noget - har de noget af værdi?*
*Tror det forsvinder med tiden. Færøerne vil være selvstændige.*
*Tvivler på, at det betyder andet for Danmark end at vi sparer lidt kroner...*
*Vi har ikke meget til fælles med dem.*

Sami – næstniðasti - vitanarbólkur grundgevur m.a. soleiðis fyri hví tað er best, um Føroyar fara úr ríkisfelagsskapinum:

*De er en omfattende gældsbyrde.*

*De er homofobiske.*
*De snylter.*
*Færøerne er ikke en del af Danmark. De har ret til at bestemme over deres eget land/ territorium.*
*Handler det ikke om at færinger skal være uafhængige af Danmark, mastodonten der vil/kan bestemme alt!!*
*Jeg synes de har ret til at være uafhængige af Danmark.*
*Kan absolut ikke se nogen grund til at Færøerne skal have 2 mandater i det danske folketing og dermed risikere at vælte et flertal. Enten er man selvstændig eller også er man ikke.*
*Mener at de bør være et selvstændigt land/rige.*
*Vi betaler til et samfund hvor vi ikke har noget at sige.*

Tað er týðiligt, at jú meiri danir vita um Føroyar, jaligari er teirra hugsan um Føroyar og um týdningin hjá Føroyum fyri ríkisfelagsskapin. Men gjøgnumgangandi hugsjónin er, at Føroyar eru dýrar, og meirilutin heldur at Danmark rindar Føroyum nógv meiri í blokkstuðli, enn veruleikin er.

Á www.jaf.fo undir "Útgávur" er yvirlit yvir allar viðmerkingarnar frá svargevunum.

# GRINDAVEIÐA OG SAMKYND

At seta samkynd og grindadráp í sama bólk kann tykjast eitt sindur undarligt. Men hyggja vit at umrøðuni av Føroyum í donskum miðlum, so hava hesir spurningarnir fylt lutfalsliga nógv. Teir eru tiknir við í kanningina fyri at vita, hvussu umrøðan hevur ávirkað vitan og meiningar.

## Vitan og meiningar um samkynd

Hóast støðan hjá samkyndum í Føroyum javnan hevur verið frammi í donskum miðlum, so vita danir lítið um reellu støðuna hjá teimum samkyntu í Føroyum.

**Hvør heldur tú, at løgfrøðiliga støðan hjá samkyndum er í Føroyum?**




Ein av fimm dønum vita, hvør rættarstøðan hjá samkyndum er í Føroyum. 39% halda, at samkynd í Føroyum hava somu rættarstøðu sum samkynd í Danmark. Hinvegin halda tey allar fægstu, at tað er revsivert at vera samkyndur í Føroyum.

**Hvussu heldur tú, at rættarstøðan hjá samkyndum er í Føroyum?**




Samanbera vit bólkarnar við minst vitan við teir, sum hava hollastu vitanina um Føroyar, er munur á – men framvegis halda nærum líka nógv, at løgfrøðiliga støðan hjá samkyndum í Føroyum er tann sama sum í Danmark.

**Hvussu samd/ur ella ósamd/ur ert tú í hesi útsøgn: Tað eru fordómar um samkynd í Føroyum og tey verða diskriminerað?**




Fara vit inn á metingarnar hjá dønum um hugburðin til samkynd í Føroyum, so svarar meginparturin framvegis, at tey ikki vita. Hyggja vit hinvegin bert at teimum, sum hava roynt at geva eitt boð, so eru 24% samd ella sera samd í, at tað eru fordómar um samkynd og at tey verða diskriminerað.

**Hvussu samd/ur ella ósamd/ur ert tú í hesi útsøgn: Í Føroyum eru tað fordómar um samkynd, og tey verða diskriminerað?**




Hyggja vit at tí sama millum tey, ið vita nógv um Føroyar, so er greitt, at tey í størri mun halda, at samkynd verða diskriminerað og at fordómar eru um tey. Men sjálvt millum tey, ið annars vita nógv um Føroyar, er ein heilt stórur partur, ið sigur seg ikki vita.

Sostatt er greitt, at fjølmiðlaumrøðan av hesum máli í Danmark, har ofta hevur verið ført fram, at føroyingar hava fordómar um samkynd, hevur havt avmarkaða ávirkan.

## Vitan og meiningar um grindaveiðu

Mangan tá grind verður hildin til í Føroyum, fara blóðugar myndir sendandi kring allan heim – ikki minst til Danmarkar. Men eisini her er ávirkanin avmarkað.

**Hvussu heldur tú, at grindadráp fer fram?**




Meira enn helmingurin veit, at hvalirnir verða riknir til lands og síðan verða dripnir. Tað er tó ein fjórðingur av teimum spurdu, sum heldur, at hvalirnir verða dripnir á opnum havi. Verður farið longur inn í kanningina síggja vit tó, at tey, ið halda, at grindadráp fer fram á opnum havi sum heild eru fólk, ið hava eina sera avmarkaða vitan um øll føroysk viðurskifti.

**Hvat heldur tú verður gjørt við tvøstið og spikið, tá hvalurin er dripin?**




85% av dønum vita, at føroyingar ikki bara fara í grind til stuttleika, men at hvalurin verður etin. Eitt annað er so, at størri parturin av teimum heldur, at grindin er ein søluvøra – og ikki verður býtt ókeypis til fólkið.

Hóast danir hella ímóti at halda, at føroyingar skulu gevast at drepa grind, so vísir tað seg, at tey ikki hava nakra avgjørda hugsan um spurningin.

**Eigur grindadráp at steðga?**




Á einum stiga frá 1 til 5 – har 1 er at siga seg vera sera ósamdan í, at føroyingar skulu gevast at drepa grind og 5 er at siga seg vera sera samdan í, at føroyingar skulu gevast at drepa grind – raka tey spurdu samlað eitt sindur yvir 3,3. Tað er hvørki at vera samdur ella ósamdur í, at føroyingar skulu gevast við grindadrápi.

## Hví eigur grindadráp at halda fram?




Á sama hátt sum við spurninginum um, at føroyingar eiga at gevast við grindadrápi rakar úrslitið nærum miðjuna, tá spurt verður, hvørt føroyingar eiga at halda fram at drepa grind. Danir hella harafturat ímóti at halda, at frægasta grundgevingin fyri at halda fram við grindadrápi er, at føroyingar hava fullan rætt at gagnnýta havsins ríkidømi.

## Hugburður um grindadráp




Býta vit aftur fólkini upp í teir fýra vitanarbólkarnar, so vísir tað seg heilt greitt, at meira ein dani veit um Føroyar, meira sannlíkt er tað, at hann heldur grindadráp vera í lagi. Størri vitan um Føroyar tykist sostatt føra til meiri forstáilsi fyri føroyskum grindadrápi.

# FERÐAVINNA

Føroyska ferðavinnan hevur í stóran mun Danmark sum knútapunkt, og nógv donsk ferðafólk ferðast eisini til Føroya. Men meginparturin av dønum hava ikki verið í Føroyum og flestu teirra ætla sær heldur ikki til Føroya í nærmastu framtíð.

**Hevur tú verið í Føroyum?**




Myndin omanfyri vísir, at bert 11% av teimum spurdu hava verið í Føroyum, meðan 88% ikki hava verið í Føroyum. 1% siga seg ikki vita um tey hava verið í Føroyum ella ei.

Av teimum, sum hava verið í Føroyum, eru fleiri enn fimm ár síðani seinastu føroya-vitjan hjá meira enn helminginum. Umleið 1% av teimum spurdu siga seg hava verið í Føroyum innan seinasta árið.

**Hvussu sannlíkt er tað, at tú innan 5 ár hevur vitjað Føroyar?**




Tá spurt verður um, hvussu sannlíkindini eru fyri at tey innan 5 ár koma til Føroya, svara næstan tveir triðingar av dønum, at tað er ósannlíkt, ella at tey heilt sikkurt ikki koma. 13% siga seg ikki vita, meðan 22% siga tað vera sannlíkt, ógvuliga sann-líkt ella at tey heilt sikkurt koma.

Vit kunnu við tí staðfesta, at meðan bert 11% hava verið í Føroyum, siga dupult so nógv, at sannlíkindi eru fyri at tey innan 5 ár koma at vitja Føroyar.

**Hvussu hevði tú ferðast, um tú skuldi vitjað Føroyar?**




Tá spurt verður um hvussu tey høvdu ferðast, um tey komu til Føroyar, siga 69% at tey høvdu flogið, meðan 17% siga at tey høvdu siglt. 5 % siga at tey høvdu nýtt ymsar ferðsluhættir, men 8% siga seg ikki vita.

**Hvussu ofta heldur tú, at ferðasamband er millum Danmark og Føroyar?**




Tá danir meta um hvussu ofta teir halda ferðasamband vera millum Føroyar og Danmark svarar meginparturin, at tey halda at flogsamband vera einaferð um dagin meðan sjóvegis samband er tvær ferðir um vikuna.

**Hvørjar av hesum útsøgnum kundi verið orsøk til, at tú (aftur) fórt til Føroyar?**




Tað er fyrst og fremst føroyska náttúran, ið kann draga danir til Føroya. 71% siga, tey vildu gjarna upplivað føroysku náttúruna og 41% siga, at føroyska mentanarlívið kundi lokkað tey til Føroya. Sum sæst á myndini, eru tað serliga náttúran og mentanin, sum draga, meðan fólk eitt nú ikki síggja Føroyar sum eitt stað við spennandi arbeiðsavbjóðingum.

Samanumtikið eru tey, sum kundu hugsað sær at komið til Føroya fleiri enn tey, sum hava verið í Føroyum. Tað skuldi sostatt verið ein møguleiki fyri at økt talið av ferðafólki úr Danmark.

# VITAN UM FØROYSKAR FYRITØKUR

Fleiri føroyskar fyritøkur virka uttanfyri Føroyar. Men sum heild kenna danir ikki nógv til føroyskar fyritøkur, sum virka í Danmark.

**Hvørjar av hesum fyritøkunum, heldur tú, eru føroyskar? Tað ber til at geva fleiri svar.**




Verður spurt um hvørjar Føroyskar fyritøkur tey kenna, eru flest sum peika á fiktivu fyritøkuna "Færøfly". Tað vísir, at fólk lutvíst gita – og tað er eitt upplagt git hjá fólki, sum ikki vita so nógv. Hyggja vit at veruligu føroysku fyritøkunum Smyril Line, Bank Nordik og Atlantic Airways, eru tað nógv fleiri sum vita at Smyril Line er eitt føroyskt felag enn Bank Nordik og Atlantic Airways.

**Kennskapur til Smyril Line**




58% av teimum í Norðurjyllandi kenna Smyril Line, meðan talið liggur um 35 – 40% í flestu av hinum landslutunum.

## Kennskapur til Atlantic Airways




18% av teimum í høvuðsstaðarøkinum kenna Atlantic Airways, meðan talið liggur frá 7 – 13% aðrastaðni.

## Kennskapur til Bank Nordik




21% av teimum í Norðurjyllandi vita, at Bank Nordik er føroyskur, meðan talið liggur frá 14 – 17% aðrastaðni.

**Býtið í vitanarstøðinum millum tey, ið hava eyðkent føroysku feløgini.**




Sum myndin omanfyri vísir, so eru sannlíkindini stór fyri, at tey, sum hava peikað á Atlantic Airways sum eitt Føroyskt felag, eisini vita nógv um Føroyar.

Kennskapurin til føroysku fyritøkurnar eru avmarkaður. Av teimum trimum fyritøkunum, vit hava tikið við í kanningini, er tað Smyril Line, ið danir kenna best til, síðani kemur Bank Nordik og niðast er Atlantic Airways. Tað er greiður samanhangur millum at fyritøkurnar eru betri kendar um tær leiðir tær húsast og arbeiða.

Færøerne for så vidt angår danskerne.
Kanning um hvat danir vita og halda um Føroyar og føroyingar

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi
Mai 2013

Perma: Ole Wich
Holger Danske: www.PhotoStory.dk
© 2012 v/ Lars Bjørnsten
Dansur: Frímerki - Postverk Føroya / Ole Wich 1981 - Gravure: CZ. Slania

Myndir s. 2 og s. 3 Djóni Højgaard / Joan Ólavsdóttir / Ole Wich

Layout og uppseting: www.WICHGRAFIK.dk
Prent: Prenta, Tórshavn

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi